**10 TING UM** David Villa Sánchez

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Málmaskinan

ÁLOPSSPÆLARIN **DAVID VILLA** HEVUR GJØRT VART VIÐ SEG Í **HM ENDASPÆLINUM**, OG FRAMEFTIR SKAL HANN SKORA FYRI SPANSKA STÓRFELAGIÐ **BARCELONA**. MEN TAÐ VAR UM REPPIÐ, AT VILLA ONGANTÍÐ GJØRDIST **FÓTBÓLTSSPÆLARI**

1 David Villa Sánchez er 28 ára gamal.

2 Pápi hansara, sum var minuarbeiðari, hevur stuðlað honum sera væl. Villa sigur, at pápin var til allar venjingar hjá honum, og tá ið hann eitt skifti ivaðist í at gevast at spæla fótbólt, fekk pápi hansara hann at halda fram.

3 Tað var líkavið, at Villa ongantíð gjørdist fótbóltsspælari. Sum smádrongur breyt hann lærleggin, og tá var fótbóltsspælið í veruligum vanda. Men hann kom seg væl eftir álvarasama beinbrotið.

4 Tá hann gekk gipsaður, vandi pápin íðin vinstra beinið hjá Villa, sum var frískt, og tað hevur Villa havt stóra gleði av síðani.

5 **Hann er giftur við Patricia González, sum hann fann saman við á ungum árum, og tey eiga tvey børn.**

6 Hann spældi fyrstu ferð á spanska landsliðnum í 2005, men er síðani blivin næstbesti málskjúttin á spanska landsliðnum nakrantíð.

7 **Hagtalsfrøðingar hava gjørt upp, at Villa var besti málskjúttin í heiminum í árunum frá 2005 til 2009.**

8 Sum vaksin spælari hevur hann umboðað feløgini Sporting Gijón B, Sporting de Gijón, Zaragoza og Valencia.

9 Í farna mánaði keypti FC Barcelona Villa frá Valencia fyri slakar 300 milliónir krónur.

10 35.000 fólk møttu á leikvøllinum, tá ið David Villa var presenteraður sum Barcelona-spælari.

## SITAT



Eitt heim uttan bøkur, er sum ein kroppur uttan sál

***Marcus Tullius Cicero***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos

## MIÐLARNIR OG EG



### TÓR VERLAND JOHANSEN

SAMSKIFTISRÁÐGEVI, HYGGUR AT PINGU OG EFTIRLÝSIR UPPFYLGJARAN TIL »SKJÓT JOURNALISTIN«

**MÍTT BLAÐ - DAG OG VIKUBLAÐ**
Markedsføring, Sosialurin og Dimmalætting.

**MÍN HEIMASÍÐA**
politiken.dk, jp.dk, markedsforing.dk, portal.fo og tær 150 heimasíðurnar hjá okkara kundum.

**MÍN TÓNLEIKUR**
Nýtt og gamalt. Í løtuni skiftast sonurin og eg um at spæla ymisk løg fyri hvørjum øðrum: Hann introduserar nýggj løg fyri mær, meðan eg gevi honum innlit í rock og pop søguna. Og so jamma vit viðhvørt

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Facebook og LinkedIn



**MÍN DVD**
Pingu. DVD er mest til børnini og har er Pingu ein greiður vinnari

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Ein góður krimi er heilt ok av og á – men tað skal helst byrja og enda í somu sending

**MÍN BÓK**
Lesi for fáar bøkur fyri tíðina. The Rise of the Creative Class var áhugaverd. Krossvegir var eitt fínt íkast til kjak um átrúðna í politikki




**MÍTT MAGASIN**
Samvirke og Tænk

**MÍTT ÚTVARP**
ÚF og P1

**MÍN TELEFON**
Einaferð iPhone altíð iPhone

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Reality shows og líknandi

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Tað er trist at miðlarnir eru relativt veikir sum heild og serstakliga í mun til ta politisku skipanina. Tá journalistikkur gerst ókritiskur, er vandi á ferð. Einaferð æt ein bók »Skjót journalistin«. Uppfylgjarin kundi kanska haft heiti »Keyp journalistin«

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Dygdargóðar kjaksendingar har kvalifisera fólk kjakast konstruktivt og kritiskt um viðkomandi evnir. Eitt føroyskt DR2 og/ella P1 hevði verið deiligt. Tað allarversta eru kjaksendingar sum ikki hava tyngd – so heldur spyrja fólk á gøtuni, tað er stuttligari